Kvæðatilfar - Nr: 05

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. flokkur
(2. - 3. flokkur)

**Uppgávuslag / heiti:** Fyrisøgn 3

**Vegleiðing:**

Uppgávan er eitt høvi hjá næminginum at læra seg tekstin og stavseting samstundis. Vantandi orðini eru vald soleiðis, at næmingurin umframt vanlig orð eisini lærir skaldskaparligt mál.

Longdin á fyrisøgnini er mett at vera nøktandi til ein skúlatíma á 45 minuttir.

Lærarin lesur upp, og næmingarnir skriva tey orðini, sum mangla í tekstinum. Tá fyrisøgnin er liðug, kunnu øll kvøða tekstin saman.

**Onnur hugskot:**

Upgávan kann eisini nýtast til avskrift og aftursøgn.

Í smærru flokkunum kann uppgávan eisini nýtast sum skrivligt arbeiði í skúla ella heima við tí endamáli at venja ørindi, skriving og stavseting.